# Havnin fingið sítt




*Birgar Johannessen við nýggju bókini "Havnin – fólk og yrki 1900-1939". Bókin er fyrsta bind av tveimum*

**Mikudagin 11. juli verður móttøka í Sjónleikarhúsinum í Havn í sambandi við útgávuna av nýggju bókini hjá Birgari Johannessen "Havnin – fólk og yrki 1900-1939". Bókin er fyrst bind av tveimum**

MENTAN

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Seinastu fimm árini hevur Birgar Johannessen í Havn arbeitt miðvíst við einari stórari hondbók yvir Havnina, sum nú er komin út í fyrsta bindi. Bókin er 439 blaðsíður við umleið 1.000 áhugaverdum og viðkomandi myndum. Bókin er fyrsta bind av tveimum. Næsta bind verður um tíðarskeiðið 1940-1969.

Slíkt arbeiði er sera tíðar- og orkukrevjandi, men Birgar hevur við ídni, ágrýtni og sínum væl skipaða og greiða arbeiðsmáta, givið Føroya fólki ein veruligan fong við hesi leksikon yvir høvuðsstað okkara.

Eitt sum eyðkennir tað sum Birgar fæst við, er at tað hevur so stóran áhuga millum fólk.

Á hansara framsýningum hava tey vitjandi ofta hug at gloyma seg sjálvi burtur í tí tey síggja, tí har er so nógv ymiskt, sum fær tey at minnast aftur á farnar dagar. Stórur áhugi hevur eisini verið fyri myndunum, sum vit hava havt í blaðnum, har Birgar við lesarans hjálp hevur fingið rættan tekst undir fleiri av myndunum.

Bókin grýpur inn í alla mentanina hjá býnum. Hon byrjar við einum heiðursborgara og formonnum í býarstýrunum og borgarstjórum, síðan koma ólavsøkurnar fram til 1939. Bókin er so umfatandi at vit kunnu ikki nevna alt her, men vit kunnu t.d. nevna konfirmantar, kirkjur og samkomur, nógvar ymiskar



*Birgar er føddur í 1946 í endakamarin á loftinum í hesum húsunum í Gongini í Havn. Tað var her H. N. Jacobsen byrjaði sítt bókbindaravirki og seinni bókahandil. Familjan búði har, til tey í 1949 fluttu yvir í Lon*